# Stjóri til ílegusavnið

Nú lóg um ílegugransking er samtykt og peningur er játtaður á Fíggjarlógini, er eitt sera spennandi starv sum stjóri fyri ílegusavnið leyst at søkja.

Ætlanin er at fáa sett starvið skjótast til ber. Starvið er tíðaravmarkað til 2 ár.

### Um starvið

Stjórin fyri ílegusavnið fær ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Ílegusavninum, sum í fyrstu atløgu kemur at húsast í Almanna- og heilsumálaráðnum.

Í fyrstuni verður uppgávan at fáa skipað sjálvt ílegusavnið, harundir seta neyðugt starvsfólk aftrat stjóranum og leggja ætlan fyri arbeiðið hjá ílegusavninum.

Síðan verða uppgávurnar:

At skipa, byggja upp og fyrisita:

- Ættarbandsskrá
- Vevnaðarskrá- og-
- Diagnosuskrá

At viðgera umsóknir um loyvi at granska í skráunum.

Fyrsta uppgávan eftir at savnið er skipað verður, sambært lógini, at uppbyggja ættarbandsskránna.

### Førleikakrøv/ynskir

Ynski er at fáa umsøkjara, sum er løgfrøðingur við kunnleika til handils- og patentrætt. Tó eru onnur við viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla og royndum vælkomin at søkja.

Umframt omanfyrinevnda ynskja vit, at tann, sum settur verður, hevur:

- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving og royndir, ið kunnu javnsetast við hesi.
- Evni at seta í verk fyriskipanir.
- Nútíðar leiðslueginleikar.
- Innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting.
- Góð samstarvsevni og- vilja.
- Evni at eggja og menna leiðarar og starvsfólk.
- Vilja til at royna nýggj virkisøki og áhuga í avbjóðingum.
- Kunnleika til enskt á høgum støði, bæði í skrift og talu.

### Setanartreytir

Starvið verður sett undir Almanna- og heilsumálaráðnum við tilvísing til aðalstjóran.

Setanarøki umfatar tó alla miðfyrisitingina, t.e. Løgmansskrivstovuna og øll stjórnarráðini.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avv. yrkisfelag. Samráðing um flokking fer fram í løtuni.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra, aip@ahr.fo, tel 30 40 50, ella Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, eydunmh@ahr.fo, tel 30 40 50, har eisini ber til at fáa avrit av lógini um ílegugransking, har arbeiðs uppgávurnar í starvinum eru lýstar.

Umsókn saman við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til:

Almanna- og heilsumálaráðið
Eiraragarður 2, 100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er
10. mars kl. 14.00.



ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

Eirargarður 2 · FO-100 Tórshavn · Tel 30 40 50 · Faks 35 40 45 · ahr@ahr.fo · www.ahr.fo

>> Vit draga eina línu >> Vit seta skynsemi í hásæti >> Vit vilja vita >> Vit bróta slóð

KREA.FO · TEL 47 80 80


MOBALPA
- franskir dygdarkøkar við 25 ára garanti



á Hjalla - 188 Hoyvík
Tlf 315415 - Fax 319001
Rúni Lómstein freelance seljari tlf 505959
damor


ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

# Kervisfyrisitari til Almanna- og heilsumálaráðið

Í samband við at Talgilda heilsuskipanin, stytt THS, skal takast í nýtslu, leitar Almanna- og heilsumálaráðið eftir kervisfyrisitara at taka sær av yvirskipaðu umsitingini av skipanini.

Umsóknarfreistin er: 27. februar 2006. kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið, við at fara inn á heimasíðu okkara: www.ahr.fo, har nágreiniliga lýsingin stendur.

*Almanna- og heilsumálaráðið, umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum. Sí meira á www.ahr.fo*


